

Dennis Holm, borgarstjóri, Bogi Mortensen, samskipari og Hans Jacob Bech, havnameistari á føroyska básinum í Stavanger. Mynd Jan Müller

# Oljuvinnan í havsbrúnni: Vágbingar fara í arbeiðshandskarnar

Deil:

**Jan Müller**

04.09.2014 - 10:04

Oljan.fo

Vágbingar síggja oljuvinnuna í havsbrúnni og eru væl ávegis til at taka ímóti henni.Vágsfjørður er nevniliga næsta havn til tær stóru oljukeldurnar og útbyggingarnar eystan fyri markið. Tað ætlar borgarstjórin at gera sær dælt av.

Millum tær fýra føroysku kommunurnar, sum luttóku á stóru altjóða oljumessuni í Stavanger, var eisini Vágs Kommuna við sjálvum borgarstjóranum, Dennis Holm á odda.

Tað er greitt, at vágbingar halda seg hava nakað at bjóða vaksandi oljuvinnuni fyri eystan og sunnan – og er teirra boðskapur til oljuumheimin púra greiður: við at brúka havnina og umstøðurnar í Vágs kommunu kunnu oljufeløgini spara tíð og harvið nógvan pening.

Og hetta byggir borgarstjórin á, at spard tíð í eitt nú sigling til og frá oljuleiðunum er av stórum týdningi í hesi vinnu. Hetta er eisini nakað, sum luttøkanm á seinastu oljumessunu, hevur sannført hann um enn einaferð.

“Vit hava bygt upp sambond og eitt netverk, og tað haldi eg vit hava megnað til eitt ug. Hetta byrjaði í Stavanger í 2012 og helt so fyri mítt viðkomandi fram í Aberdeen í 2013 og nú aftur í Stavanger. Hetta er eitt týðandi stig víðari í royndum okkara at bjóða Vág fram sum veitingarstað til altjóða oljuvinnuna, “ sigur Dennis Holm við oljan.fo.

Hann vísir á, at tey hava nú í eina tíð arbeitt við at betra umstøðurnar á havnaøkinum í Vági, soleiðis at tey í framtíðini kunnu bjóða seg fram til altjóða oljuvinnuna, sum arbeiðir hinumegin markið.

“Endamálið við hesi seinastu oljumessuni var at fáa fundir í lag og menna sambondini og práta við tey fólkini, sum sita so tætt upp at avgerðunum sum gjørligt. Tað haldi eg eisini eydnaðist sera væl.

Vit eru komin so mikið langt, at tað nú liggur eitt sera spennandi arbeiði fyri framman fyri okkara viðkomandi. Vit hava latið okkum í teir stóru arbeiðshandskarnar, og eg eri sera spentur um, hvat fer at henda.”

Dennis Holm sigur víðari, at tann stóra avbjóðingin hjá Føroyum og hjá teimum sjálvum er at formidla tann boðskapin, at tað er ein fyrimunur at fara til Føroya.

Í tí høpinum liggur Suðuroyggin fjarstøðuliga ómetaliga væl fyri t.d. í mun til Lerwick. Tann boðskapin heldur hann vit so smáttu eru um at fáa gróðurfest í oljuvinnuni.

Harnæst er avbjóðingin at fáa tey fyristøðufeløgini, sum arbeiða í grannalagnum, at skilja ella síggja, hvørjir møguleikar eru her og hvat vit hava at bjóða.

“Vit hava longu fasilitetir í Vági, sum eru uppá pláss. Vit hava eitt stórt havnaøki, eina djúphavn og eitt stórt uppland, sum er tøkt til oljuvinnuna, atgongd til innandura goymslu osfr. So nógv av tí, sum oljuvinnan hevur tørv á, finst longu, og tí skulu vit ikki til at gera nýíløgur til at kunna fara í gongd. Vit kunnu fara í gongd í næstu viku, um tað so skal vera. Og tað er tann boðskapin vit royna heilt miðvíst at formidla.”

Dennis Holm sigur, at tey nú bíða eftir at fáa reaktiónir frá ymsum feløgum og fyritøkum, sum tey hava verið í sambandi við. Sjálvur heldur hann, at boðskapurin um Føroyar, Suðuroynna og Vág er komin fram til oljufeløgini, sum nú vita, at Føroyar eru førar fyri at veita tænastur og her ikki minst, at tíðin frá feltunum til næstu havn kann styttast munandi, um eitt felag, sum arbeiðir eystan fyri markið, velur at fara til t.d. Vágs at bunkra og fáa nógvar aðrar tænastur, heldur enn at fara til Lerwick ella annað pláss har

um leiðir. Bara tann munurin er einar 5 tímar. Og taka vit so aðrar havnir sum Aberdeen, Peter Head ol. so er frástøðan uppaftur longri.

Dennis Holm sær einki løgið í, at fleiri føroyskar havnir og kommunur luttaka á eini oljumessu, um tær vilja bjóða seg fram at veita tænastur til altjóða oljuvinnua. Og her ætlar Vágur so ikki at standa aftanfyri hinar. Hann heldur sjálvur, at tað er óført, at tað hevur eydnast at fáa ein boripall inn á Skálafjørðin. Tað er so avgjørt við at varpa ljós á Føroyar sum veitaraland.

Vágur brynjar seg nú til at kunna taka ímóti í fyrsta lagi oljufólkum, sum vilja síggja umstøðurnar har suðuri við egnum eygum og í øðrum lagi at lata havnina upp fyri oljuskipum av alskyns slagi.

“Og vit síggjast aftur í Aberdeen næsta ár,” leggur tann hóvligi men miðvísi borgarstjórin aftrat.




















